## Símun skoraði



Keflavík, sum spælir í bestu íslendsku fótbóltsdeildini, hevði í gjárkvøldið vitjan av Váli, og tað gekk einki serligt hjá heimaliðnum, har vágbingurin Símun Samuelsen er ein av spælarunum. Válur dró longra stráið og vann dystin. Válur var á odda 3-0, áðrenn júst Símun Samuelsen minkaði um munin til 3-1, ið gjørdist úrslitið av dystinum.

## Brøndby stríðst uttan eydnu

Danska superligaliðið Brøndby hevur stórar trupulleikar við at vinna dystir á útivølli. Sunnudagin fingu teir ein nýggjan kjans í dysti ímóti Horsens. Heimaliðið legði bragdliga fyri og kom fram um 2-0. Teir á Brøndby-liðnum góvu ikki upp, og teir megnaðu at vinna seg innaftur á Horsens. Seinasta partin av dystinum fall alt til jarðar, tí Horsens gjørdi tvey mál afturat og vann sostatt 4-2. Brøndby liggur sum nummar 9 av 12 liðum í superliguni.



u eygum, tá Petur Reinert eftir 43 minuttum gav honum marchordrar í Gundadali

Mynd: Álvur Haraldsen

VB/Sumba-AB 1-2 (1-0):

# AB heldur um vónina

**Tvey mál frá Johan Ellingsgaard vissaðu AB trý kærkomin stig í Vági. Enn hevur AB vónina, men tað tykist alt minni sannlík, at teir ikki skulu spæla fyrstudeildarfótbólt komandi kappingarár**

VB/S

AB

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Her á síðunum tóptu vit dystin fyri eitt ervi, og fyri taparan mundi hetta í øllum førum kennast sum ein veruleiki sunnudagin. Gaman í hevur VB/Sumba enn matematiska møguleikan at hanga fast í Formula-deildini, men við sjey dystum eftir og 11 stigum upp til B71 tykist tann uppgávan meira enn møtumikil.

Tað ger hon sum so eisini hjá AB, sum hóast sigurin enn hevur átta stig, sum skulu vinnast aftur í somu sjey dystum. Men hóast alt hanga teir enn fastir í vónini um, at tað skal eydnast at lívbjarga sær.

**Tvey misnýtt brotsspørk**

Á vøllinum tóktust báðir partar tó hava alt at spæla fyri. Frá fyrsta bríksli varð nógv lagt fyri, og tað gekk heldur ikki long tíð, áðrenn vertirnir høvdu lagt seg á odda. Dan Djurhuus fekk møguleikan úr ellivu metrum, og hann sveik ikki álitið.

Sama møguleika fekk Allan Mørkøre stutt fyri hálvleik. Men eydnan var ikki við veteraninum hjá AB, og so vóru vertirnir á odda í steðginum.

Eftir steðgin snaraði dysturin tó heilt. Johan Ellingsgaard var atvold til mikið kjak, tá hann sendi bóltin í netið til 1-1. Linjuverjin hevði flaggið á lofti, tí hann helt talan vera um rangstøðu. Men tað helt dómarin tó ikki, og so kundu vágbingar mótmæla tað, sum teir vildu.

VB/Sumba fekk tó enn eina ferð møguleikan frá brotssparksblettinum, men tá Dan Djurhuus skuldi royna seg seinnu ferðina, stóð Magnus E. Poulsen í AB-málinum fyri. Tað gav argjamonnum møguleikan at taka alt norður, og enn eina ferð varð Johan Ellingsgaard rætta maðurin á rætta staðnum, tá hann við 2-1 málinum sendi VB/Sumba í kolkjallaran.

**Hava møguleikan**

Umboð fyri bæði liðini søgdu í Útvarpinum, at so leingi, sum vónin er til staðar, verður spælt fyri at halda fast um sessin í Formula-deildini.

Her hevur AB enn vónina, og hóast tað eisini her er trupult, so er talan ikki um heilt so vónleysa støðu. Her verða teir báðir komandi dystirnir tó sera avgerandi. Tá hevur AB heimavøll móti ávíkavist GÍ og KÍ, og megnar liðið at fáa seks stig úr teimum

## Valdi rætt

Stóra hetjan hjá B36 eftir dystin móti KÍ var bert 18 ára gamli Jóan Pauli Jacobsen, sum við brotssparksbjargingini í yvirtíðini helt B36 á oddasessinum í landskappingini.

Sjálvur tóktist unglingin tó hava bæði beinini væl og virðiliga á jørðini, eftir at hann fyri triðju ferð í tvey ár mátti traðka inn av beinkinum fyri Jákup Mikkelsen.

- Hesa ferðina var kanska nakað øðrvísi, enn tað hevur verið hinar báðar ferðirnar. Fyrst og fremst tí meira tíð var eftir av dystinum. Og at trýstið tí gjørdist størri.

Og hvat hugsaði tú so, tá KÍ fekk brotsspark í yvirtíðini?

- Eg veit ikki, um eg hugsaði so nógv. Sjálvandi vildi eg bjarga, og tá Heðin er lámur, roknaði eg við, at hann skeyt handan vegin.

So tú hevði valt síðu, áðrenn hann skeyt?

- Ikki heilt. Men tað var í øllum førum tað, sum eg roknaði við. Og tíbetur var tað rætt gitt, segði Jóan Pauli eftir dystin.

**-mørk**

## Hyggja uppeftir

Heðin av Lakjuni var sjálvandi ikki nøgdur um, at hann ikki tók av, tá møguleikin beyðst at taka trý stig við sær úr Havnini. Men tá ringasta vónbrotið var sodnað, helt hann kanska, at hetta var til at liva við hjá KÍ.

- Sjálvandi vilt tú altíð vinna. Og eitt brotsspark eigur at geva mál. Men sum støðan var undan dystinum, so vildu vit sagt ja takk til ein javnleik á útivølli móti B36.

Sæð í mun til KÍ fyri tveimum mánaðum síðani, so er gongdin hjá tykkum munandi betri. Er tað eisini stuttiligari at spæla fótbólt í KÍ nú, enn tað var?

- Heilt avgjørt. Tá úrslitini eru við, verður hugurin sjálvandi tað betri. Nú vilja vit bara vita, hvussu langt vit kunnu røkka, og tann spurningurin hevði sæð enn betri út, um vit vunnu í dag. Vit tosa kanska ikki um heiðursmerki, men tað er líka langt upp til tey, sum tað er niður til niðurflytingarstrikuna. So vit halda, at vit eins væl kunnu hyggja uppeftir, sigur KÍ-liðskiparin.

**-mørk**